## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**

1. deild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 01.12 | 14.30 | Kyndil-VÍF |
| 01.12 | 15.00 | Stjørnan-Tjaldur |
| 01.12 | 14.30 | StÍF-VB |

1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 01.12 | 16.00 | Kyndil-VÍF |
| 01.12 | 16.00 | KÍF-Tjaldur |
| 01.12 | 16.00 | StÍF-H71 |

**Flogbóltur**

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 30.11 | 13.00 | KÍF-Mjølnir |
| 01.12 | 13.00 | Fleyr-Dráttur |
| 01.12 | 15.00 | TB-ÍF |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 30.11 | 15.00 | Fram-Mjølnir |
| 01.12 | 15.00 | Fleyr-SÍ |

## Hondbóltsstøður

### 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB | 7 | 7 - 0 - 0 | 172 | 136 | 36 | 14 |
| 2 | VÍF | 8 | 5 - 0 - 3 | 182 | 153 | 29 | 10 |
| 3 | StÍF | 8 | 4 - 0 - 4 | 185 | 193 | -8 | 8 |
| 4 | Stjørnan | 7 | 3 - 1 - 3 | 146 | 153 | -7 | 7 |
| 5 | Neistin | 9 | 3 - 1 - 5 | 167 | 185 | -18 | 7 |
| 6 | Kyndil | 7 | 3 - 0 - 4 | 176 | 167 | 9 | 6 |
| 7 | Tjaldur | 8 | 1 - 0 - 7 | 157 | 198 | -41 | 2 |

### 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | StÍF | 9 | 7 - 0 - 2 | 264 | 234 | 30 | 14 |
| 2 | VÍF | 9 | 6 - 0 - 3 | 290 | 234 | 56 | 12 |
| 3 | Neistin | 9 | 6 - 0 - 3 | 258 | 243 | 15 | 12 |
| 4 | Kyndil | 8 | 4 - 1 - 3 | 223 | 215 | 8 | 9 |
| 5 | KÍF | 8 | 2 - 1 - 5 | 201 | 207 | -6 | 5 |
| 6 | H71 | 8 | 2 - 0 - 6 | 191 | 232 | -41 | 4 |
| 7 | Tjaldur | 9 | 2 - 0 - 7 | 216 | 278 | -62 | 4 |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 7 | 6 - 1 | 20 | 6 | 14 | 12 |
| 2 | ÍF | 7 | 5 - 2 | 19 | 11 | 8 | 10 |
| 3 | Mjølnir | 6 | 4 - 2 | 15 | 9 | 6 | 8 |
| 4 | Dráttur | 6 | 3 - 3 | 12 | 14 | -2 | 6 |
| 5 | KÍF | 7 | 1 - 6 | 7 | 18 | -11 | 2 |
| 6 | Fleyr | 7 | 1 - 6 | 4 | 18 | -14 | 2 |

### Meistaradeild, menn

| | | d | v - t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 6 | 6 - 0 | 18 | 0 | 18 | 12 |
| 2 | Fram | 5 | 3 - 2 | 10 | 6 | 4 | 6 |
| 3 | Mjølnir | 3 | 2 - 1 | 6 | 4 | 2 | 4 |
| 4 | SÍ | 4 | 1 - 3 | 3 | 9 | -6 | 2 |
| 5 | Fleyr | 6 | 0 - 6 | 0 | 18 | -18 | 0 |

# Aftur toppdystur í Trongisvági

**Hesaferð skal ÍF royna at reisa seg eftir tapið fyri Drátti, og Mjølnir ætlar sær at fáa KÍF niður aftur á jørðina**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Kunning-FBF*

Meistaradeildin hjá kvinnum tók líkasum eina spennandi vend seinasta leikumfar. Dráttur, ið ikki rættiliga hevði megnað at gjørt seg galdandi millum sterku liðini í deildini, megnaði at koppa ÍF. Við sigrinum kom Dráttur við í toppstríðið aftur, og ÍF misti oddasessin, men tað kann alt broytast hetta leikumfarið. Hin spennandi søgan er KÍF.



*ÍF er einasta liðið, sum hevur vunnið á TB í meistaradeildini í ár. Um vikuskiftið vitja tær í Trongisvági, har tær skulu royna at økja um spenningin í oddastríðnum*

### KÍF flúgvandi

KÍF fekk síni fyrstu stig nakrantíð í meistaradeildini enntá við at vinna 3-0 ímóti Fleyr. Líka væl sum hetta kom við hjá KÍF, líka illa mundi tað koma við hjá Fleyr, og fyri venjaran fekk hetta ta avleiðing, at hann er avsettur. KÍF hevur hetta leikumfarið Mjølnir á vitjan, og hetta er onnur og nógv torførari uppgáva enn Fleyr, men sjálvsálitinum hjá KÍF feilar so einki. Mjølnir tapti tepurt fyri TB seinasta leikumfar, serliga tí slagstyrkin frammi við netið manglar, og tað er als ikki vist, at KÍF ikki kann gera sær dælt av hesum. Mjølnir kemur til Havnar fyri at vinna, tí hvussu vit enn venda og snara sakini, so er KÍF eitt lið, ið Mjølnir eigur at vinna.

### Toppdystur í Trongisvági

Aftur hetta vikuskiftið er Trongisvágur karmur um toppdyst hjá kvinnunum. TB tekur ímóti ÍF, og hesin dysturin er ógvuliga áhugaverdur. Sum eisasta lið hetta kappingarárið hevur ÍF megnað at vinna á TB. Tað var á Kambsdali fyrr í kappingarárinum. Tann dysturin endaði 3-2, og var tá hildið, at úrslitið var óvæntað.

ÍF hevur víst at tær ætla sær allan vegin hetta kappingarárið. Tær taptu heldur óvæntað fyri Drátti seinast, men skaðar vóru helst partvís atvoldin til tað. Kann ÍF fara til Trongisvágs við sterkasta liði, so er dysturin púra opin, og einasta, ið kann metast sum avgerandi, er, at TB hevur heimavøllin – hvussu nógv tað so enn hevur at siga.

### Fleyr í kreppu?

Havnarliðið Fleyr hevur havt eina út av lagið vánaliga kappingarbyrjan. Botnurin var tapið fyri KÍF seinast og tað, at leikararnir hava tikið avgerð um at biðja venjaran gevast. Um talan er um veruliga kreppu ella bara neyðuga tillagingartíð er kanska ov tíðliga at siga enn, men gongdin má og skal vendast, og dysturin ímóti Drátti sunnudagin fer at geva eina ábending hvat væntast kann av Fleyr í framtíðini. Sálarligi parturin av flogbóltsspælinum hevur sera stóran týdning. At nýggjur venjari er komin kann hava neyðugu broytingina við sær, men Dráttur hevur við sigrinum á ÍF víst, at tær eru nóg sterkar til toppstríðið í bestu kvinnudeildini. So góðar verða fleyrkvinnurnar neyvan eftir einari løtu, men nú kann bara ganga uppeftir hjá teimum.

# Silvurstríðið

**ÍF tykist hava tikið einkarætt upp á oddasessin í bestu flotbóltsdeildini, men spenningurin er stórur um næstu sessirnar. Leygardagin hittast Fram og Mjølnir í einum lykladysti um hesar**

MANSFLOGBÓLTUR
*Kunning-FBF*

Fram og Mjølnir renna saman leygardagin í Hoyvíkshøllini í ”silvurdystinum”. ÍF hevur sett seg tungt á oddasessin og einastu liðini, ið tykjast kunna hótta oddaliðið bara eitt sindur, eru Fram og Mjølnir. Fyrsti dysturin í kappingarárinum var millum hesi liðini, og tá vann Mjølnir greitt 3-1. Síðan tá hevur Mjølnir bara leikt tveir dystir, so tá ið talan er um dystarvenjing, so er Fram betur fyri.

Verður hugt at liðunum mann fyri mann, so hevur Mjølnir kanska sterkara liðið, serliga við sínum báðum bulgarum, men Fram hevur megnað ógvuliga væl at lofta sær eftir at Rúni Weihe fór, og liðið spælir nú á allar streingir. Fær Fram blokkin rættiliga at rigga, so verða stigini verandi í Havn, men eydnast tað ikki, so verður tað Mjølnir, ið fer avstað við øllum.

### Tvey vónbrotin lið

Fleyr og SÍ hava skuffað fullkomuliga higartil. Serliga SÍ hevur als ikki megnað at liva upp til tær vónir, ið settar vórðu til liðið. SÍ hevur vunnið sær sæti í steypafinaluni, men í landskappingini hevur gingið av skriðuni. Við Borko og Raiko hevur SÍ tveir at bestu smasharunum í landinum, men spælið hevur kortini ikki víst seg at rigga. Aðrir góðir leikarar eru eisini, og borið saman við liðið frá seinasta kappingarári eru broytingarnar ikki so stórar, men útslitini mangla framvegis.

Hjá Fleyr var kanska væntandi, at hetta kappingarárið fór til at umstilla og seta við, og við tí í huga er kanska ikki so løgið at liðið er niðast í deildini, men júst nú sær út til, at um nakað stig skal fáast til høldar, so skal tað vera ímóti SÍ. Hesin dysturin fer at gera av, um SÍ kann fóta sær og vinna seg uppeftir. Eisini fer hann at gera av hvussu illa tað stendur til í Fleyr, og um felagið má taka til tokka við botnplássinum.

Vikuskifti

Nr. 231 • leygardagur • 30. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

50 brúkarar – 50 loysnir

Í morgin, 1. desember, fyllir Frítíðarheimið í Skrivaragøtu í Havn 25 ár. Og dagurin verður eisini rættiliga hátíðarhildin



Lesið síðu 4 & 5



*Dánial og Elias, og hini børnini, fáa nógvar løtur at ganga í tónleikahølinum í kjallaranum í Svínoyar skúla*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Ungir tónleikarar í Svínoy

Elias og Dánial fluttu fyrr í ár til Svínoyar saman við familjuni. Teir hava fingið loyvi at nýta eitt rúm í skúlanum til tónleikastovu, sum teir sjálvir hava innrættað til endamálið. Her dyrka teir báðir sín tónleik

TÓNLEIKUR
*Solby A. Eliasen*

Elias og Dánial eru ávíkavist 14 og 13 ára gamlir. Teir vísa okkum inn í eitt høli í kjallaranum í skúlanum.

- Her sær ikki so gott út beint nú, men hetta er so okkara tónleikarúm, siga báðir við ein munn og hava hug at flenna eitt sindur.

Inni í rúminum standa eitt keyboard, ein elektriskur gittari, ein kassagittari og ein urga. Eisini stendur eitt stereoannlegg á einum borði og ein rúgva av fløgum liggja rundan um. Elias tekur ein stól og setur seg við gittaranum, meðan Dánial setur seg við urguna. Dánial byrjar at spæla sálmalagið Nærri mín Guð til tín, meðan Elias situr og hyggur at. Tað liggur sera væl fyri hjá Dániali at spæla upp á urguna, og hann hyggur konsentreraður niður á føturnir, meðan hann spælir lagið. Dánial venur upp á urguna, tí tað hevur verið upp á tal, at hann møguliga kann fara at loysa av í Svínoyar kirkju, um tað kann gerast neyðugt. Tí venur hann so gott sum bara sálmaløg fyri tíðina.

Tá hann er liðugur við lagið, byrja báðir at spæla eitt annað lag saman. Tað sást væl á teimum, at teir eru vanir við at spæla saman, og at teir hugna sær við tí.

Dánial sigur, at hann byrjaði at spæla klaver, tá hann var um tíggju ára gamal. Hann spældi hjá Stamen Stanchev. Og tað var hesin sami, sum heitti á Dánial um at koma at spæla og syngja til eitt tiltak, har peningur varð savnaður til Kosovo. Tá sang Dánial Mín ketta dansar tango.

Elias byrjaði at spæla gittar, tá hann var 11 ára gamal. Hann gekk á musikkskúlanum í Havn, har denturin varð lagdur á at spæla klassiskt eftir nótum. Men tað tímdi hann ikki so væl og gavst. Glið kom kortini á aftur gittarspælið, tá hann lærdi seg at spæla til onkra góða fløgu ella sangir við grepum til. Hann sigur, at hann roynir at læra seg sjálvan.

- Eg veit ikki, hvussu tað gongur, men mær dámar væl at spæla gittar, sigur hann.

Í Havn spældu dreingirnir eisini upp á trummur, men onki trummusett er í Svínoy, og tað eru teir harmir um.

Men so hinvegin gevur tað teimum møguleika til at menna seg sjálvar innan klaver og gittar.

### Ítrivskjallari

Hølið, sum vit eru stødd í, er í kjallaranum í skúlanum. Umframt hetta tónleikahølið er eitt annað høli eisini, sum verður nýtt til ítriv. Í løtuni arbeiða børnini við slípa horn inni har. Maskinurnar til hetta eru frá hornavirkinum, sum var í Svínoy fyri nøkrum árum síðani. Tey slípa ymiskar lutir sum til dømis lyklatyssi og hálsbond. Tað dámar teimum sera væl, og tey fegnast um at hava møguleika fyri at gera ymiskt kreativt, tá tey sjálvi hava hug.

Foreldrini, Rakul og Ásmundur fegnast eisini um, at børnini hava møguleika til at fáast við ymisk ítriv í Svínoy, og at tey hava eini høli til tað. Avmarkaðu møguleikarnir fyri frítíðarítrivunum hjá børnunum kunnu eisini síggjast sum ein góður møguleiki hjá teimum at finna útav, hvat tey veruliga hava áhuga fyri við tað, at tey í Svínoy fáast nógv við tey ítrivini, sum eru.

Teimum dámar væl at lurta eftir tónleiki og Dánial plagar at dansa "break" eisini. So hóast tað ikki eru nógv ítróttarlig ítriv í Svínoy, so keða børnini seg so avgjørt ikki har. Og tey hava ov mikið at takast við nú tann møguliga so drúgvi veturin stendur fyri durum.